## Eingin øl í Parkini

Ein avgerð hjá europeiska fótbóltssambandinum FIFA hevur nú við sær, at øl kann ikki seljast til europeiskar dystir. Í Danmark verður nógv gjørt burtur úr ølsøluni í sambandi við fótbóltsdystir, men tá ið FCK mikukvøldið spælir fyrsta heimadystin í Champions League, verður bert alkoholfrítt øl at fáa.

Marknaðarstjórin hjá Carlsberg heldur, at tað hevði verið betur, um fólk kundu keypt sær øl undir dystinum, heldur enn at tey drekka áðrenn dystin.

- Vit vita eisini frá HM í summar, at tað ber væl til at hava dystir uttan trupulleikar, hóast øl verður selt á stadion undir dystinum, sigur Keld Strudahl við Ritzau.

## Eriksson fjalir seg



Sven-Gøran Eriksson var ongantíð væl lýddur sum landsliðsvenjari í Onglandi, og eftir harðar atfinningar í summar, hevur Eriksson tikið seg aftur og sæst lítið alment. Eriksson skuldi verða við á eini ráðstevnu í Berlin um vikuskiftið, har hann skuldi eftirmeta HM-endaspælið í Týsklandi, men Eriksson gav avboð.

– Hann hevur fingið nóg mikið. Hann heldur, at fólk alla tíðina royna at fáa fram, at hann er ein vánaligur persónur og venjari, sigur Lennart Johansson, UEFA-forseti um orsøkin til, at Eriksson ikki varð við á ráðstevnuni um HM-endaspælið

# til Skála

Skála

NSÍ

**Skála – NSÍ 2-0 (0-0)**
1-0: Debus Danielsen, 48.
2-0: Jónhard Fredriksberg, 67.
**Dómari:** Lassin Isaksen
**Skála:** Vlada Filipovic – Pætur Dam Jacobsen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Jóhan Troest Davidsen – Bjarni Jørgensen (Debus Danielsen, 46.), Pauli Hansen, Alexandur Johansen (Poul N. Poulsen, 74.), Nenad Stankovic, Levi Hansen (Bárður Danielsen, 74.) – Jónhard Fredriksberg.
**Gult kort:** Eingin
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Viggo Johannesen, Helgi L. Petersen, Iulian Florescu – Einar Hansen (Sonni L. Petersen, 64.), Bogi Løkin, Justinus R. Hansen, Andy Olsen – Óli Hansen, Christian Høgni Jacobsen.
**Gult kort:** Óli Hansen, Brynjolvur Nielsen.

**KYKMYNDIR**

Mál, hæddarpunkt og samrøður eru at síggja á www.portal.fo



*Skála vann rættiliga sannførandi ímóti NSÍ og spældi helst nakað av tí besta, teir hava spælt í ár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

allar skammiligasta gylta møguleikan, eftir at Helgi L. Petersen hevði lagt honum bóltin fyri føturnar.

Tá vespurnar ikki høvdu hug at prika, so revsaði Skála tað í hinum endanum. Miðskeiðis í seinna hálvleiki fær Jónhard Fredriksberg bóltin í vinstra borði. Hann ger eitt lítið trekk, og á brotsteigarhorninum smekkar hann til. Bólturin fer fúkandi eftir svørðinum og brestur í handaru stong áðrenn støkkur í málið. Eitt flott mál frá landsliðsleikaranum.

Eftir hetta flutti Skála bóltin skilagott sína millum. Teir framdu onkra verjukendar útskiftingar, Alexandur Johansen og Levi Hanssen vórðu tiknir út, og Bárður Danielsen og Poul N. Poulsen settir inn, og síðani varð dysturin stýrdur heim uttan stórvegis hóvasták.

Tað vóru ikki teir stóru kjansirnir, sum komu hesa løtuna, men í sjálvari yvirtíðini fekk Jónhard Fredriksberg ein gyltan møguleika at staðfesta sigurin, men júst sum starvsfelagin á landsliðnum, so kiksaði hann fyri opnum máli.

Hetta hevur tó lítið at siga. Skála vann rættiliga sannførandi, og spældi helst nakað av tí besta teir hava spælt í ár. Hinvegin vóru runavíkingar nær við at revsa teir, tá teir ikki fingu bóltin inn, men vantandi neyveikin kostaði ikki hesaferð.

# Nú eru vit tryggjaðir í deildini

**Christian Høgni Jacobsen viðgongur, at rumbli í NSÍ seinastu vikuna hevur havt sína ávirkan í fyrireikingunum til dystin, meðan Pauli Hansen hjá Skála sigur, at sigurin mánakvøldið tryggjaði teimum verandi sæti í bestu deildini**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Eftir dystin fingu vit orðið á teir báðar liðskiparanar hjá liðunum báðum, Paula Hansen hjá Skála og Christian Høgna Jacobsen hjá NSÍ.

– Munurin á liðunum í dag skal helst síggjast í, at vit spældu bólt frá byrjan. Vit hildu bóltin niðri á jørðini, og eg haldi hetta mann vera nakað av tí frægasta vit hava spælt í ár, greiddi Pauli Hansen frá.

Christian Høgni Jacobsen er hinvegin fáorðaður, tá hann verður spurdur til dystin, men staðfestir, at sigurin til Skála var fult uppiborin.

– Ja, tað er ongin ivi um, at tað var rætta liðið í vann, sigur Christian Høgni Jacobsen stutt og greitt.

*Í prinsippinum hevur Skála ikki nakað serligt at spæla fyri, nú teir liggja sum teir gera á stigatalvuni. Spurningurin er so, hvussu motiveraðir Skálaleikararnir eru til ein slíkan dyst?*

– Nú hevur nógvur slatur gingið seinastu tíðina um bæði venjari og leikarar eru á veg úr felagnum, og onkur teirra til NSÍ, so vit vildu gjarna vísa NSÍ nakað. Og so er ein grannauppgerð av hesum slagnum ongantíð nakar trupulleiki at seta seg upp til, sigur Pauli Hansen, liðformaður hjá Skála.

### Venjaraskiftið

Hjá NSÍ hevur ikki bara slatur um venjaraskift gingið í Runavík. Tað er ein veruleiki, at Trygvi Mortensen er koyrdur og at hetta er fyrsti dystur teirra í ár, har hann ikki er við róðrið. Og landsliðsáleyparin hjá NSÍ váttar, at hetta hevur havt sína ávirkan.

– Nú hava vit havt ein drúgvan steðg síðani við landsliðsfótbólti í millum landskappingardystirnar, og síðani er venjarin eisini skiftur út, so tað hevur verið eitt sindur av rumbli, sum hevur havt sína ávirkan, sigur Christian Høgni Jacobsen.



*Brennandi spurningurin er so, hvussu lagið í NSÍ-leguni er nú?*

– Tað er langt síðani seinast, at vit hava tapt fýra dystir á rað, so í løtuni er lagið í botni. Hetta mugu vit fáa vent nú, og sunnudagin hava vit GÍ á heimavølli, og tað skuldi verið ein møguleiki at vent gongdini, sigur liðformaðurin hjá NSÍ, Christian Høgni Jacobsen, at enda við Sosialin.

*Hjá Skála er lagið sjálvandi gott, nú teir hava vunnið á grannunum í Runavík, men hvat fáa Skálamenn brúkt ein tílíkan sigur til?*

– Eg haldi eg kann siga, at við sigrinum í dag eru vit tryggjaðir í deildini, og tá vit annars spæla fyri at vinna hvørja ferð, so er hetta eisini ein sigur í so máta, sigur liðformaðurin hjá Skála, Pauli Hansen.